# Festivallandið Føroyar

**Seinastu festivalljósini eru slóknað og festivalárið 2005 eydnaðist sera væl við út í móti 20.000 seldum atgongumerkjum og vinningi til allar festivalarnar. Men longu nú eru fyrireikingarnar til festivalárið 2006 farnar av bakkastokki.**

## Summar Festivalurin, 4.-6. august 2006



– Vit hava gjørt eftirmetingar og eru sera væl nøgd. Tað er eisini gott at síggja at so nógvir festivalar hava verið og at allir hava borið seg. Hetta er aðru ferð at vit skipa fyri festivalinum, og vit gjørdu okkum nógvar áhugaverdar royndir. T.d. bara tað at eitt so stórt tiltak ber til og tað, at veðrið ikki hevur alt at siga. Í ár royndu vit at hava tiltakið friggjadag og leygardag, og tað riggaði væl, sigur Steintór Rasmussen, ein av fyriskiparunum av Summar Festivalinum.

– Vit fingu eisini roynt økið av í ógvuliga vátum veðri; tað regnaði í eina heila viku, og alíkavæl toldi bøurin trýstið av nógvum túsund áhoyrarum, tí eru vit eisini farin at umhugsa næsta ár at hava okkurt sunnudag.

– Fyrireikingarnar til 2006 eru ikki komnar so langt. Men vit hava avgjørt at halda fast í sama konsepti. Tónleikurin skal fevna breitt, við tónleiki og tiltøkum sum venda sær til familjur, og so við nøkrum aktuellum nøvnum sum venda sær til ungdómin. Vit vita væl at tað er ringt at gera øllum til vildar, men vit fara at royna.

– Vit settu eitt sera høgt støði í ár og ætla okkum ikki at taka støðið niður. Vit ætla heilt víst at hava dagsaktuell nøvn aftur næsta ár.

– Harumframt skulu tilboðini til børn og barnafamiljur gerast betri. Tey vóru ikki partur av festivalinum í ár, men vit hugsa um at gera barnaarmbond, sum geva atgongd til barnatiltøk og annað fyri børn.

– Vit hugsa eisini um at gera økið enn størri, og at umskipa tað eitt sindur.

## MjúS, 24. juni 2006



– Hetta var fyrstu ferð, at vit skipaðu fyri MjúS og vit hava lært nógv. Fyrst og fremst at byrjast skal í betri tíð. Vit eru so smátt farin at fyrireika 2006. Vit hava m.a. avgjørt at halda festivalin sama vikuskiftið næsta ár, tó er enn ikki avgjørt, um hann skal vera ein ella tveir dagar, sigur Katrin Petersen, høvuðsfyrireikari.

– Vit vurderaðu eitt sindur aftur og fram, um vit skuldu flyta MjúS av jóansøku vikuskiftinum, men vit síggja ongan vinning fyri okkum í at flyta festivalin. Vikuskiftið áðrenn ganga tey ungu enn í skúla, og vikuskiftið aftan á er tættari við G!.

– Eg haldi at eisini, at ummælið av jóansøkufestivalinum, sum kom á planet.fo sunnumorgunin eftir konsertina, var so himmalrópandi positivt, at tað vísti at pláss var fyri báðum tiltøkum. So tað er gott. Vit hava ikki tikið nakrar avgerðir viðvíkjandi tónleikinum. Í ár var aktualitetur leisturin fyri tónleikaúrvalið, og eg vænti, at tað verður samið leistur næsta ár. Men eg kundi eisini væl hugsað mær, at vit eisini høvdu onkra góða tónleikauppliving við, sum var við, tí hon var góð. Vit ætla ikki at skera í játtanini, heldur brúka meira pening til tónleikanøvn.

– Í ár vóru nakrir trupulleikar við skipum, men Strandferðslan hevur við serligum ferðaætlanum til Summar Festivalin og Ovastevnuna skapt presedens, og tí verður væntandi eingin trupulleiki við at fáa eykatúrar til næsta MjúS.

## Jóansøkufe[stivalurin,] 24. juni



– Vit hava eftirmett Jóansøkufestivalin, og halda at hann gekk væl. Vit høvdu nakrar greiðar ætlanir og tær eydnaðust allar. Vit vildu hava ein festival sum gav fólki góðan tónleik í góðum kørmum. Maturin skuldi vera góður og fólk skuldu hava tað stuttligt. Alt hetta lukkaðist, sigur Tróndur Enni, ein av fyrireikarunum.

– Tá AS Sweet spældu var fantastiska lívligt, fólk høvdu tað ordiliga stuttligt. Tiltakið mól eisini runt, so tað er gott.

– Skúlagarðurin riggaði væl sum konsertstað. Festivalurin verður tó fluttur í 2006, tí Jóansøkan fer til Vágs, men hevði nokk eisini verið flutt alíkavæl tí ein skúlagarður er ikki serliga romantiskur. Vit hugsa um at halda hann á Vágseiði. Vit høvdu eisini onkur onnur pláss í huganum í ár, men høvdu ikki tíð at skipa fyri tí, tí varð skúlagarðurin ein neyðloysn.

– Vit hava ikki tosað um 2006 enn, men fara ivaleyst at umskipa tiltaki[ð] eitt sindur, royna at ger[a] alla Jóansøkuna meir[a] spennandi, og fáa alt a[t] virka sum eina heild[.] Nýggi Smyril er eisin[i] komin tá, so tað ger al[t] meira spennandi, fyri stilla tær livandi tónlei[kar] umborð á Smyrli.